gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# Ikki gávuhýrur – men ein rættur

Føroyska arbeiðararørslan vann ein sigur afturat í Løgtiginum hesa vikuna, tá tingið samtykti, at tann tímalønti arbeiðarin nú fær sjúkradagpening frá fyrsta dagi. Tað merkir, at hann kann vera sjúkur, uttan at hann hevur ampa av, at hann missir tvær daglønir.

Í dag er tað ein sjálvfylgja, at tey tímaløntu fáa dagpening, tá tey eru sjúk. Men vit skulu bara 25 ár aftur í tíðina, tá landsstýrismaðurin í arbeiðsmarknaðarmálum, Jákup Lindenskov, í hesum blað kunngjørdi, at hann arbeiddi við eini lóg um sjúkradagpening fyri tímalønt.

Lógin varð fyrireikað og skipanin varð sett í verk í 1979 við Steinbirni Lilaa sum leiðara, men tað var við tógvið bit og slit. Danska stjórnin skuldi gjalda sín part, tí vit høvdu framvegis endurgjaldsskipanina – skipanin við blokkstuðli kom ikki fyrr enn í áttatiárunum – og stjórnin vildi ikki, at fólk skuldu fáa endurgjald frá fyrsta sjúkradegi, uttan at arbeiðsgevararnir goldu ein part eins og í Danmark.

Men arbeiðsgevararnir vildu ikki hoyra talan um henda møguleikan, og tað nyttaði ikki landsstýrinum at seta hart á, tí Fólkaflokkurin var eisini í landsstýrinum. Úrslitið varð tí, at tímalønt fingu ikki sjúkradagpening teir báðar fyrstu dagarnar – vit fingu tí teir báðar ”karensdagarnar”.

Í kreppuárunum fingu fastlønt heldur ikki løn teir báðar fyrstu sjúkradagarnarm, men tá kreppan var hasað av, og skotið varð upp at strika ”karensdagarnar”, skeyt Javnaðarflokkurin upp, at tímalønt eisini fingu endurgjald fyri fyrstu sjúkradagarnar, men hesum tóku landsstýrisflokkarnir ikki undir við av ávísum orsøkum.

Men nú er lógin broytt, og ein órættvísi er beindur av vegnum. Í einum sosialdemokratiskum vælferðarsamfelag er tað ikki annað enn ein rættur, at fólk fáa løn ella dagpening, tá tey eru sjúk. Tí kann ikki takast undir við, at Løgtingið var í gávuhýri týsdagin, sum Útvarpið málbar seg, tá tað boðaðifrá tíðindunum. Hetta er ein sjálvsagdur rættur í einum framkomnum samfelag! Í skrivandi løtu verða flagg vundirn á stong kring alt landið – vit hava flaggdag og hátíðarhalda Merkið – men latið fløggini í dag eisini veitra til heiðurs fyri hetta framsig hjá føroyska arbeiðaranum!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til tíðindafluttning í Útvarpi Føroya

**Anna Dalsgaard**

Hetta er ein áheitan til tíðindafólkið í Útvarpi Føroya!

Uttan at gera stórvegis viðmerkingar til tíðindaflutningin generelt, fari eg at heita á tykkum, um at hugsa um, hví tit meta at eini tíðindi eru av týdningi fyri føroya fólk. Í gjár bórust sera ræðandi tíðindi um, at nú var tað kanska betur at verða eitt sindur sól stoktur enn at smyrja seg inn í sólkrem. Hetta vidundurmiddul, sum vit hava trúð uppá í áravís. Ikki er langt síðani, at vit enntá fingu at vita, at um sólkremið skuldi gera nakran mun, skuldi ein hálvur dunkur smyrjast uppá annan hvønn tíma. Eitt tunt lag gjørdi hvørki frá ella til.

Men hvat nú? Nú situr alt Føroya fólk og ímyndar sær, at hevur ein verið í hóslag við hetta eitrið, ið tað jú er at sammeta við p.t., hevur ein helst verið sær sjálvum og enn og verri, eisini børnum sínum at bana.

Eg helt meg ikki kunna brúka tíðindini til nakað annað, enn fjáltur og ræðslu. Einki varð sagt um, hvørji evnini vóru, ið vóru vandamikil ei heldur hvørji merki, ein skuldi vara seg fyri. Hetta hevði kanska eisini verði í so møtumikið, tí tey eru eini 70 í tali. Men útvarpið kundi veitt lurtarum sínum ta tænastu, at upplýst um, at á heimasíðuni hjá Miljøstyrelsen, er listi gjørdur yvir tey merki, ið higartil eru registrerað, fyri at innihalda hesi vandamiklu evni.

Kann annars upplýsa fyri teimum, ið ikki hava atgongd til internetið, at evnini, ein skal vara seg fyri eru:

- 4-methylbentzylidenne camphor,
- Octyl methoxycinnamate
- Benzophenone-3

# Viðmerking til Jacob Vestergaard

**Jógvan Krosslá**



Viðv. viðmerkingum (meiningum), sum Jacob Vestergaard hevur í Dimmalætting nr. 74 og 75 um økismenningarálitið, sum var handað Torbjørn Jacobsen í VB húsinum í Vági, tann 9. apríl 2001.

Jacob Vestergaard, sum er formaður í Sumbiar kommunu og formaður í Føroya kommunufelag, hevur góðan hug at vísa sína meining viðv. stórum og smáum kommunum, Jacob er vitandi um, at uppskotið til kommunusamanlegging er ikki reist av størru kommununum, men av ymiskum skiftandi landsstýrum.

Størru kommunurnar hava roynt at laga seg til at taka ímóti uppgávum, sum skulu leggjast frá landsumsitingini út til kommunur at umsita og eru vælvitandi um at slíkar umsitingar kosta meira fyri kommunurnar, tað er jú meiningin við útleggingini, tað er at vit kunnu umsita okkum sjálvi og gjalda fyri tað sum tað kostar, hettar fyri at fáa fólk at flyta til kommunurnar úti um landið og tey størvini, sum í dag annars liggja í Tórshavnar kommunu, kunnu leggjast út til kommunurnar, eisini til Tórshavnar kommunu. Skulu uppgávur leggjast frá landsumsitingini út til kommunur at umsita, so verður tað neyðugt við størri kommunueindum ella økiseindum, annars fáa vit neyvan umsitingina útlagda og soleiðis fáa vit heldur ikki størvini út um landið.

Tá ið Jacb sipar til, at Hvalbiar kommuna sjálv rindar fyri at gera sína havn, so er fyrst til tað at siga, at tað er rós verdugt og fáa teir vónandi eina góða havn til sítt virkna sjófólk, sum er ein styrkur fyri alla suðuroynna, men tað tykist sum eitt spark til Vágs kommunu, sum hevur ditta sær at biðja landið um hjálp til eina djúpvatnshavn, vit eru so bláoygd í Vágs kommunu, at vit meta hettar at vera gott fyri alla Suðuroynna og ikki minst okkum í sunnaru helvt.

At Hvalbiar- og Lopransfjørður eru betri fjarðir enn Vágs- og Tvøroyrarfjørður, tað kann so ikki vera ennað enn ein joke.

Jacob sigur eisini at tær stóru kommunurnar vilja leggja kommunurnar saman fyri at ráða yvir smærri kommunum? Tá ið kommunur leggja saman verða tær allar størri.

Annars til Økismenningarálitið, tað er nógv gott í álitinum.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



## VIÐMERKINGAR

# Hava fullan rætt at seta tiltøk í verk

**Tíðindaskriv í sambandi við viðurskiftunum á Sp/F Viking Fisk**

**Føroya Arbeiðarafelag**
*Tórshavn, hin 24. apríl 2001*

Stjórin í Sp/F Viking Fisk, Hendrik Tausen, hevur í fjølmiðlunum gjørt viðmerkingar til viðurskiftini í sambandi við, at felag okkara hevur sett limum okkara forboð móti at taka upp arbeiði á virkinum og annars at hava nakað við hetta virki at gera.

Av tí at frágreiðingin hjá Hendrik Tausen ikki er røtt skulu vit her greiða frá gongdini í málinum.

**Prosentgjøldini**
Felagið Sp/F Viking Fisk hevur ikki goldið tey prosentgjøld, sum sambært sáttmálanum skulu gjaldast til limagjald, eftirløn og lívstrygging hjá limunum í Føroya Arbeiðarafelag, hóast felag okkara ferð eftir ferð hevur rykt eftur hesum peningi. Allatíðina hevur tað verið eitt stutt tíðarskeið ið goldið hevur verið fyri til tíðina, og so hevur aftur verið galið.

Vit heittu tí á advokat okkara um at krevja inn henda pening, og advokaturin hevur 4. apríl 2001 skrivað Sp/F Viking Fisk bræv, har heitt varð á virkið um at gjalda nevndu prosentgjøld á konto hjá advokatinum.

Viðmerkjast skal, at kravið varð sent til advokat, tí vit til fánýtis høvdu kravt peningin frá virkinum.

Áðrenn vit sendu út lýsingina um at seta limum okkara forboð móti at taka arbeiði á virkinum, fingu vit váttan frá advokati okkara um, at eingin peningur var goldin á konto hansara.

Seinni fingu vit fráboðan um, 11. apríl, ella beint fyri páskir, vóru prosentgjøldini goldin beinleiðis á konto okkara, uttan at Sp/F Viking Fisk, ella Hendrik Tausen, hevði boðað okkum ella advokati okkara frá, at peningurin var fluttur. Hendrik Tausen kundi antin havt goldið peningin til advokat okkara ella boða advokatinum ella okkum frá, at peningurin var goldin, tí so hevði eingin misskiljing verið viðvíkjandi nevnda peningi.

Hinvegin hevur Sp/F Viking Fisk framvegis ikki goldið innheintingargjald, sum gjaldast skal, tá krav verður sent til advokat til innheintingar, hóast hetta innheintingargjald er beinleiðis nevnt í skrivinum frá advokatinum. Sp/F Viking Fisk skyldar tí framvegis henda pening, sum vit hava heitt á advokatin um at krevja inn, um neyðugt við stevning.

**Avleiðingin av at arbeiðsgevari ikki rindar prosentgjøldini**
Tað tykist ikki sum stjórin í Sp/F Viking Fisk rættiliga hevur skilt tann týdning tað hevur fyri starvsfólk hansara, at prosentgjøldini verða goldin og tær sera álvarsligu avleiðingar tað kann fáa um gjøldini ikki verða goldin.

Tað er nevniliga soleiðis, at um arbeiðsgevari ikki rindar prosentgjøldini, sum ásett eru í sáttmálanum, so missa arbeiðsfólkini tey rættindi, sum liggja í m.a. lívstryggingarskipan okkara og trygging fyri álvarsliga sjúku.

Hetta er orsøkin til, at leiðslan í felag okkara tekur slík mál í størsta álvara, tí tey flestu kunnu helst ímynda sær tað sera álvarsligu støðu, sum tey sum eftir sita koma í, um ein av limum okkara doyr, og tað so vísir seg, at viðkomandi ikki var dekkaður av lívstrygging okkara, tí arbeiðsgevarin ikki hevði goldið prosentgjøldini. Sama er galdandi um ein av limum okkara gerst álvarsliga sjúkur, tí hóast skipan okkara gevur limunum rætt til útgjald í sambandi við slíkar sjúkur, so er tað ein treyt, at prosentgjøldini eru goldin og at arbeiðsfólkið er skrásett sum limur í lokalfelag okkara.

**Fundurin í Oyndarfirði**
Tað er rætt, at nevndarlimur í Føroya Arbeiðarafelag var við á fundi á virkinum í Oyndarfirði, har Hendrik Tausen legði fram nøkur skjøl. Umboðini frá feløgunum sóu ein lønarseðil, sum ikki var í lagi viðv. limagjaldi, eftirløn og lívstrygging, og tímatali ið arbeitt var, var ikki upplýst á lønarseðlinum.

Vit hava tí ikki sæð nakrar lønarseðlar, sum vísa at Sp/F Viking Fisk hevur goldið sáttmálaásetta løn, men hinvegin hava vit frætt, at lønin sum goldin er útlendsku arbeiðskvinnunum var lægri enn tað sum ásett er í sáttmálanum.

**Limaskapur í Føroya Arbeiðsgevarafelag**
Sambært sáttmála okkara við Føroya Arbeiðsgevarafelag, so hava limir okkara ikki rætt at taka upp arbeiði á virki, sum ikki er skipað sum limur í arbeiðsgevarafelagnum, og somuleiðis er ásett, at arbeiðsgevarar bert hava rætt at hava í arbeiði fólk, sum eru skipaði í fakfelag okkara, tá tað snýr seg um sáttmálaøki okkara.

Vit hava fingið váttan um, at Sp/F Viking Fisk ikki er, og ongantíð hevur verið, limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, og frammanfyri nevnda eksklusivavtala gevur okkum tí fullan rætt, at seta limum okkara bann ímóti at taka arbeiði á virkinum hjá Sp/F Viking Fisk.

**Samandráttur**
Vit kunnu tí staðfesta, at Viking Fisk hevur virkað undir óskipaðum viðurskiftum, og fyri at eingin ivi skal vera um rætt okkara at seta limum okkara bann móti at taka arbeiði á virkinum, so skulu vit endurtaka:

- at Sp/F Viking Fisk ikki er limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag,
- at Sp/F Viking Fisk ikki hevur goldið tey prosentgjøld, sum ásett eru í sáttmálanum fyrr enn advokatur okkara hevði hótt við stevning,
- at SP/F Viking Fisk framvegis ikki hevur goldið innheintingargjald í sambandi við, at prosentgjøldini vórðu send til innheintingar,
- at tey arbeiðsfólk, sum hava arbeitt á virkinum hjá Sp/F Viking Fisk ikki hava verið dekkað av lívstryggingini og tryggingini viðvíkjandi álvarsligari sjúku,
- at tað er ábyrgdin hjá leiðsluni í Sp/F Viking Fisk, at arbeiðsfólk teirra ikki hava verið dekkaði av nevndu tryggingum,
- at Føroya Arbeiðarafelag ikki hevur fingið nakað skjalaprógv fyri, at Sp/F Viking Fisk hevur goldið arbeiðsfólki sínum sáttmálasettu lønina.

Fjølmiðlarnir hava eisini seinastu dagarnir borið tíðindi um, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur tikið loyvi at virka fisk frá felagnum, og hetta er bert enn eitt prógv um hvussu umstøðurnar hava verið á virkinum.

# Økisfundur í Sørvági

## Annar økisfundurin hjá Javnaðarflokkinum verður vesturi í Vágum

Fundurin verður skipaður í sambandi við ársaðalfundin hjá Vága Javnaðarfelag, fríggjakvøldið 27. apríl kl. 20 í húsunum hjá Sørvágs Húsmøðrafelag.

Tann fyrsti var í Skálavík.

Fundirnir verða skipaðir sum politiskar kvøldsetur við politiskum talum, orðaskifti, sangi og práti. Borðreitt verður eisini við breyði og viðskera.

Fundurin í Skálavík eydnaðist sera væl. Væl av fólki var saman komið, og orðaskiftið, prátið og sangurin gekk framúr væl.

Vága Javnaðarfelag vónar, at fundurin í Vágum verður minst líka væl vitjaður, og at sambandið við tingmanningina og floksskipanina á henda hátt kann verða til gagns fyri flokk og limir.

SU hevur eisini fingið fótin fyri seg í Vágum. Felagið vónar, at tey ungu nýta høvi eisini at vera við til hetta tiltakið. SUarar koma vestur at hitta SUarar og annan ungdóm í Vágum, sum hava áhuga fyri javnaðarhugsjónini.

Javnaðarflokkurin stendur seg hampiliga væl í veljarakanningunum, og javnaðarumboðið úr Vágum skuldi havt góðar møguleikar aftur at komið á ting. Flokkurin hevur fyrr verið størsti flokkur her vesturi, og tað eigur hann aftur at blíva.

